# Lívi› er vert at liva

Ella kanska skuldu vit vent tí vi› og spurt: Er lívi› vert at liva?

Ofta ver›ur tiki› til, at lívi› er so herligt og deiligt. Ja, tá ta› gongst væl, sjálvandi. Men ta› er ein sannroynd, at lívi› ikki altí› er so lætt at liva. Og hvør seg›i at ta› skuldi vera ta›? Vit kenna øll til ta›. At kenna seg einsamallan og vir›isleysan. Ta› er júst í hesum tí›arskei›um, at vit kanska hava brúk fyri at gera naka› heilt anna› enn ta› vit eru von vi›.

Eini gó› rá› eru tí at gera ta›. Sjálvur var eg í fjør á ítróttarháskúla í Aalborg í Danmark, og kann eg vi› vissu siga, at hetta er so avgjørt naka› av tí allar allar besta eg nakrantí› havi gjørt. Háskúlalívi› er rætt og slætt so ótradionelt og so langt frá øllum tí vanliga gerandislívinum, sum til tí›ir tekur ræ›i á okkum. Ja, ótradionelt, men í veruleikanum er ta› nógv meira spennandi enn á flest ø›rum skúlum. Ta› eru nøkur heilt onnur vi›ri, sum gera seg galdandi. Lívi› fær innihald og gerst vert at liva. Aalborg Sportshøjskole er ein av mongu ítróttarháskúlunum í Danmark. Ein av teimum allar bestu skal eg heilsa og siga. Nógv føroysk ítróttarfólk hava eisini veri› á júst hesum skúlanum. Eitt nú Sophus Dal Christiansen, sum í farnu viku førdi besta mansli›i› hjá Kyndli til sigurs í steypakappingini, hevur veri› har. Eisini fótbóltsleikararnir, John Petersen og Sigfrí›ur Clementsen, hava roynt kreftir á Aalborg Sportshøjskole.

Ta› eru nógvir føroyingar á ymiskum ítróttarskúlum runt um í Danmark, og ta› er kanska ikki ov nógv sagt, at hetta veruliga er naka› sum hevur vundi› uppá seg seinnu árini. Føroyingar eru allasta›ni ver›ur so mangan tiki› til.

Men ta› er ongin loyna, at nógv teir flestu føroyingarnir, sum fara av landinum fara til Danmarkar.

Sum omanfyri nevnt, var eg í fjør á Aalborg Sportshøjskole, og í hesum sambandi er ein grein at lesa um skúlan í bla›num í dag.

Sum vit á›ur hava nevnt í bla›num, var bla›stjórin á Yngd í Århus herfyri. Og ta› er ikki so líti› ein upplivir á einum slíkum túri. Í seinasta bla›i› høvdu vit eina grein í nevndist “Århus by Night”. Í dag kemur so onnur greinin, sum er úrslit av hesum túri. Evni er service. Tí ta› er nevnliga botn vánalig service tann fer›andi fær í Føroyum í mun til í Danmark. Og trúgv mær. Munurin er stórur.

Av ø›rum tilfari kunnu vit nevna teir føstu tættirnar, sum aftur í dag eru vi› okkum. Hitlistar og Svara so eru nakrir av hesum tættum. Eisini hevur fløguummælari okkara, Dagfinn Olsen, veri› ein túr uppi í 3-arinum í SMS, har hann hevur valt sær tríggjar fløgur at ummæla. Hvat Dagfinn hevur fingi› burtur úr, síggja tit sum vant á baksí›uni.




**Tí›indabla›i› Sosialurin**
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

*Ábyrgdarbla›stjóri:*
Jan Müller

*Bla›stjórn:*
Jákup Bogi Joensen

*Uppseting:*
Karis Olsen

Yngd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

## Les Yngd í Sosialinum
## Hvønn mikudag

## Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd“. Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3‘aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.



Jákup Bogi Joensen

# Áh den service...

***Sum á›ur nevnt her í bla›num var undirrita›i í Århus herfyri. Eitt, eg leg›i merki til á túrinum var, at danir duga nógv betur enn føroyingar. Í hvussu so er, tá talan er um service***

Herfyri var undirrita›i í Århus í stuttum ørindum. Fari› var umvegis Keypmannahavn til Århus, har nógvir føroyingar undir útbúgving savnast. Í hesum umfari fara vit tó at lata útbúgvingarnar liggja. Vit venda heldur eyguni móti or›inum service.

Kann her ikki lata vera vi› at nevna, at stórur munur er á tí service, sum tú sum fer›andi fær í Føroyum og Danmark. Her ver›ur serliga hugsa› um ymisk vi›urskifti innan fer›avinnuna, men eisini í a›rar mátar. Havi seinasta ári› fer›ast rættiliga nógv í Danmark, og má ásanna, at munurin er stórur á føroyingum og



## 50 kr. takk

dønum. Í hvussu so er tá talan er um service.

Fór úr Havn ein mánamorgun. Ve›ri› var hampuliga gott, men tók mær tó ein taxa oman á farstø›ini, solei›is at lættari skuldi vera at koma avsta› vi› øllum tí vi›føri eg hev›i vi› mær.

Men eg má siga, at eg ógva›ist vi› tá eg sá, hvussu taxachaufførurin bar seg at. Áh den service má eg bara siga.

Ikki tí. Bilurin stó› í túninum til tí›ina, men chaufførurin ikki so miki› sum skeitti at vi›før›inum, eg kom vi›. Har var onki at gera. Eg var sjálvur noyddur at finna út av at fáa vi›føri í bili. Men ikki nokk vi› tí. Komin oman á farstø›ina skundar chaufførurin sær at siga, at túrurin kosta›i mær 50 krónur. Sí›ani vildi hann hava meg út sum skjótast, og vi›føri mátti eg sjálvur fáa úr aftur bilinum.

Slíkur atbur›ur eigur eftir mínum tykki ikki at síggja dagsins ljós. Og ta› ger hann heldur ikki. Í Danmark væl at merkja. Nei, har er service eitt lyklaor›, tá talan er um fer›avinnu og fer›afólk.

Havi ongantí› enn uppliva›, at chaufførur í Danmark ikki hevur tiki› sær av at fáa vi›føri títt upp í bilin og úr aftur bilinum. Í›an, hetta hevur als onki uppá seg, og eigur eftir mínum tykki bert at vera sjálvsagdur partur av arbei›inum hjá bilføraranum.

Men ta› eigur tó at vera nevnt, at ta› hóast alt finnast førarar í Føroyum, i› eru sera dugnaligir, og sum seta stóran prís á service.

Men lat ta› ver›a sagt beinanvegin. Ta› eru ikki bert taxachaufførararnir, sum hava nógv eftir at læra, tá talan er um service. Eisini Strandfer›slan, i› hevur ábyrgdina av bussunum hjá bygdalei›um, hevur naka› at læra.

Havi ilt vi› at skilja, hví bussurin, í hesum føri flogrutan, altí› skal vera so nógv seinka›. Hava føroyingar veruliga altí› lyndi til at koma í sí›stu løtu, ella tá ov seint er?

## Flogfeløgini gó› fyrimynd

Hóast eitt sindur seinka›, komu vit vestur í Vágar í øllum gó›um. Á sjálvum vøllinum stó› flogfari› hjá Atlantic Airways og bí›a›i eftir at sleppa á flog.

Eg gjørdi skjótt av. Fekk mær fatur á billettini, slapp mær av vi› vi›føri, og á›renn eg visti av, var tí›in komi til at fara umbor›.

Havi á›ur hildi›, at ta› er vánalig service á Atlantsflog, men hesafer› var anna› skil. Eg hev›i bara sett fótin innum og heilsa› uppá flogternuna, sum stendur í durunum og b‡›ur vælkomin umbor›, á›renn onnur flogternan spurdi meg, hvar eg skuldi sita. Hon vísti mær sí›ani á plássi›, og vi›føri› hjálpti hon mær vi› at fáa upp í lítlu skápini omafyri. Ta› er ta›, man kann kalla› service.

Men hetta var ikki ta› einasta, eg merkti til service á túrinum. Eftir at flogfari› hev›i lætt sær á, og sett kósina móti Kastrup Lufhavn í Keypmannahavn, komu sera fryntligu og fyrikomandi flogternurnar, sum vanligt er, vi› gó›um mati og drykkjuvørum. Ikki bara eina fer› ella tvær fer›, men upp til fleiri fer›ir komu tær og spurdu, um ta› var naka› vit høvdu tørv á. Hurrá, Atlantic Airways leingi livi›.

Túrurin til Keypmannahavnar gekk væl, og vit lendu í Kastrup í øllum gó›um.

Sí›ani skuldi eg bí›a í knappar tveir tímar, á›renn eg skuldi flúgva ví›ari til Århus vi› SAS. Men Kastrup Lufthavn er í dag vor›in ein so stórur bygningur, at tú saktans kanst fáa teir bá›ar tímarnar at ganga rættiliga skjótt. Bert at finna yvir í innanríkisterminalin tók sína tí›, so skjótt skal berast at, hóast talan er um tveir heilar tímar í Kastrup. Komin umbor› á annars risa stóra SAS flúgvaran ávegis til Århus, mundi eg fingi› chock.

Har var service so ta› baskar. Talan var um ein sera stuttan flogtúr. Einans 18 minuttir, men hóast hetta, komu flogternurnar heilar tvær reisur og spurdu, um vit skuldu hava meira kaffi. Fittar, fryntligar og fyrikomandi vóru tær eisini. Man merkti veruliga, hvussu ta› bleiv tiki› hond um ein umbor›. Áh den service.

Í Århus Lufthavn gekk ta› bæ›i skjótt og væl at fáa vi›føri› út, í bussin, og sí›an gekk lei›in inn til sjálvan Århus b‡.

Ta› skal her at enda sigast, at danir duga sum heild væl, tá ta› kemur til júst slíkar uppgávur. Teir virka tilvita›ir um, hvat teir gera, og ta› ver›ur gjørt ordiligt.

Solei›is merkir tú ta› ikki í Føroyum. Í hvussu so er í so stóran mun sum í Danmark.

Spurningurin, sum tó kann standa ósvara›ur í langa tí› framyvir er tí:

## Hví?



Tilvildarligar myndir